†

Kunngjørt verður at kæra mamma, systir, vermamma, omma og langomma

**HILDA ABRAHAMSEN**

ættað úr Mykinesi, búsitandi í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 31. juli, 85 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin kl. 14.00

*Familjunnar vegna*

**Kirstin og Steingrím**




*Tað er fyritøkan, Mekanor í Klaksvík, við Kjartani Hansen, sum hevur gjørt nýggju brúnna á 43 ára gamla línubátinum, Jákup B*
*Myndir: Poul Eiden Müller*








# Jákup B nýggja brúgv

**Maningin á línuskipinum, Jákup B úr Klaksvík, kann gleða seg til, at umstøðurnar umborð verða munandi betur, tá klárt verður at fara til fiskiskap einaferð í heyst**

UMVÆLING
*Rúna Siverten*

Tá Skipasýnið kravdi ábøtur í galluni á Jákup B, gjørdi reiðarí'ið av, at gera størri umbyggingar umborð, eitt nú at gera nýggja brúgv.

Beint eftir norðoyastevnu varð skipið lagt, og nú, tveir mánaðar seinni, er nýggj brúgv komin á bátin.

Brúgvin er í tveimum hæddum. Á niðaru hæddini er nýtt baðiverlisi, skipara- og stýrimanskamar.

Undir dekkinum er nýggj galla, messa og gongd. Messan er dupult so stór, sum hin gamla, og er skaffingarrúm og sjónvarpsstova í einum.

Grímur Lassen, reiðari, sigur, at tá skipið er so gamalt, er ikki nóg mikið við ábótum.

- Tað, sum verður gjørt av umvælingum umborð, verður gjørt av nýggjum, so hvørt sum fíggjarligu umstøðurnar loyva tí, sigur hann.

Umvælingarnar hesaferð kosta um 5 til 6 milliónir krónur.

Tað er Kjartan Hansen, skipsbyggjari, sum eigur fyritøkuna, Mekanor í Klaksvík, ið hevur bygt nýggju brúnna.

Við Jákup B eru 14 mans, skipari er Sámal Jákup Olsen úr Klaksvík.



# Eykajáttanin til Norðoyatunnilin á veg



*Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sigur, at í nærmastu framtíð verður peningur játtaður til framhaldandi arbeiðið við Norðoyatunnilinum*

**Alt bendir nú á, at eykajáttanin, sum Landsverkfrøðingurin gjøgnum Vinnumálaráðið hevur søkt um til Norðoyatunnilin, er á veg. Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, vísir tó á, at Landsverkfrøðingurin og Vinnumálastýrið eru sera seinir í vendingini**

NORÐOYATUNNILIN
*Heini í Skorini*

Í Sosialinum í gjár vísti borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, á ónøgdsemi sítt við gongdina í málinum við ognan av jørð til vegagerð í Klaksvík í sambandi við Norðoyatunnilin. Landsverkfrøðingurin, Oyvindur Brimnes, vísti á, at bíðað verður eftir játtanini, teir hava søkt eftir gjøgnum Vinnumálaráðið.

## Peningur játtaður í næstum

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, vísir í viðmerking til hetta á, at Fíggjarmálaráðið fer at ganga fyrispurninginum á møti um meiri pening til verkætlanina.

- Í næstu viku verður landsstýrisfundur, og tá verður m.a. arbeiðið við Norðoyatunnlinum á skránni. Fleiri onnur øki verða eisini við á eykajáttanini, men Landsverkfrøðingurin fær játtað nakað niðanfyri eini hálvari millión, sigur Karsten Hansen.

Henda eykajáttan fer sostatt væntandi at seta gongd á arbeiðið við keypi ella ognartøku av jørð, sum Landsverkfrøðingurin, Oyvindur Brimnes, vísti á í Sosialinum í gjár.

## Jørðeigarar skuldu langt síðani fingið boð

Karsten Hansen vísir víðari á, at eykajáttanin eigur ikki vera nøkur undanførsla til ikki at vera komin longri við arbeiðnum við ognarjørðini.

- Teir, sum hava við hetta arbeiði at gera, skuldu langt síðani fingið samband við eigararnar av jørðini, tí teir hava vita alt í meiri enn eitt ár, sigur fíggjarmálaráðharrin. Karsten Hansen heldur fram og sigur, at í mars mánaði var ein kunnandi fundur um verkætlanina, og tá reisti ein av privatu jørðeigarunum seg upp og spurdi, hví eigararnir ikki høvdu fingið nakað at vita enn. Svarið frá P/F Norðoyatunnilin var, at eigararnir fingu brøv her og nú.

## Umbøn um pening kom seint

Karsten Hansen fílist eisini at útsøgnirnar hjá Landsverkfrøðinginum um, at bíða verður eftir peningi. Hann vísir á, at umbønin frá Vinnumálaráðnum kom sera seint til Fíggjarmálaráðið.

- Vit fingu fyrispurning um eykajáttan so seint sum beint áðrenn Tingið fór í summarfrítíð, og eftir mínum tykki skuldi hon verið komin fyrr, sigur Karsten Hansen.

Hann leggur afturat, at Vinnumálaráðið visti, nær evstamark var til eykajáttan, og um teir høvdu søkt fyrr, høvdu teir eisini havt peningin tøkan til arbeiðið nú.

## Enn ein eykajáttan

Hóast viðurskiftini sambært fíggjarmálaráðharranum skudli verið komin uppá pláss fyrr, fær Vinnumálaráðið og harvið Landsverkfrøðingurin sostatt pening játtaðan at halda á við arbeiðnum við ognarjørðini í Klaksvík, og talan er sostatt um enn eina eykajáttan, hóast tað fleiri ferðir hevur verið frammi, at haldast skal til fíggjarlógina uttan nakrar eykajáttanir.

- Sjálvsagt er málið altíð, at fíggjarlógin skal halda árið út, men onkuntíð broytast viðurskiftini, umframt at ætlanir ikki ganga, sum tær skulu. Tá er neyðugt við eykajáttanum, sigur Karsten Hansen.

Spurdur, hvar sparingar so vera, nú peningur verður fluttur til hetta økið, sigur Karsten, at tað er ikki møguligt at siga heilt nágreiniliga í løtuni.

- Talan er í hesum høpi um eina umraðfesting, har fleiri peningur verður játtaður til hetta arbeiði, og so skal minni peningur nýtast á øðrum økjum. Hvørji økini eru, er ikki møguligt at siga nú.

Sostatt verður tað ynski gingið á møti, sum bæði Landsverkfrøðingurin, Vinnumálastýrið, P/F Norðoyatunnilin og ikki minst Klaksvíkar Kommuna hava vónað skuldi koma. Í næstu viku verður landstýrisfundur um hesi viðurskifti, og við hesi eykajáttan kemur væntandi meiri ferð á arbeiðið at útvega ognarjørðina til vegagerð í Klaksvík.


